UTTAN ÚR HEIMI

## Kommunurnar brúka ov nógv

Tað gongst illa hjá teimum donsku kommununum og amtunum at halda ta árligu fíggjarætlanina.

Ein kanning vísir nú, at í fjør nýttu kommunurnar og amtini 3,8 milliardir krónur meiri enn ásett á fíggjarætlanini. Tey, sum hava gjørt kanningina, siga, at nýtslan var alt ov stór í fjør, og at kommunurnar mugu taka nøkur álvarssom stig, skal fíggjarstýringin ikki fara heilt av leið. Tey vísa eisini á, at gongdin er sera óheppin, nú tosað verður um at broyta donsku kommunuskipanina við nógv færri kommunum enn nú.

Thor Pedersen, fíggjarmálaráðharri, er eisini sera vónsvikin av teirri stóru nýtsluni hjá kommununum. Við Jyllandspostin sigur hann, at kommunurnar hava brúkt alt ov nógvar pengar til tænastur, og at tær hava brotið fíggjaravtaluna, sum stjórnin og kommunufelagið gjørdu í fjør. Formaðurin í kommunufelagnum, Ejgil W. Rasmussen, heldur ikki, at kommunurnar hava brúkt ov nógv til tænastur, og hann spyr, hvørjar tænastur stjórnin vil hava tær at skerja.

## Litríkt valevni

Tá týsku politikararnir sunnudagin fara at velja nýggjan forseta, fáa teir møguleikan at atkvøða fyri einari kvinnu.

Tað er tann 61 ára gamla Gesnie Schwan. Hon er professari í statsvísindi og stjóri á lærda háskúlanum í Frankfurt a.d. Oder. Hóast hon ikki verður hildin at hava stórvegis møguleikar sunnudagin, hava týsku fjølmiðlarnir gjørt nógv burtur úr uppstilling hennara. Teir lýsa hana sum eitt litríkt valevni. Sjálv heldur hon, at Týskland hevði havt gott av at fingið eina kvinnu í forsetaembætið, og at hennara lætta lyndið hevði komið týskarunum væl við í hesum búskaparligu krepputíðum.

Alt bendir kortini á, at teir týsku politikararnir fara at velja tann 61 ára gamla búskaparfrøðingin Horst Køhler til forseta. Hann var varafíggjarmálaráðharri hjá Helmuth Kohl og hevur verið stjóri í altjóða gjaldoyragrunninum IMF, men segði upp, tá hann sbleiv uppstillaður til forsetavalið. Hann skal taka við eftir tann 73 ára gamla Johannes Rau, sum hevur valt at leggja frá sær eftir at hava røkt forsetaembætið eitt valskeið.

## Myndin var falsað

Ein bretskur hermaður er tikin og skuldsettur fyri at hava falsað eina mynd av bretskum hermonnum, sum gjørdu seg inn á fangar í Irak.

Myndin, sum hermaðurin skal hava falsað, stóð í blaðnum Daily Mirror fyri nøkrum døgum síðani, og hon vakti stóran ans og elvdi til øði í Bretlandi. Á myndini sóust bretskir hermenn fóru illa við irakskum fangum. Seinni kunngjørdi bretska verjumálaráðið, at talan var um eina falsaða mynd. Eitt nú varð víst á, at ein lastbilur, sum var á myndini, hevur ongantíð verið í Irak. Nú verður sagt, at minst ein hermaður er tikin og skuldsettur fyri at hava falsað myndina.

Seinasta fríggjadag noyddist blaðstjórin á Daily Mirror, Piers Morgan, at fara úr starvinum, eftir at tað var vorðið avdúka, at myndin, sum blaðið gjørdi nógv burturúr, var falsað.

## Danskur flokkur fer í søguna

Broytir Sosialistiski Fólkaflokkurin í Danmark ikki ta politisku kósina, fer flokkurin í søguna um tíggju ár.

Tað heldur í hvussu er Pernille Frahm, sum sjálv er næstfremsta valevnið hjá Sosialistiska Fólkaflokkinum á valinum til Evropatingið í summar. Hon kemur við teirri døpru metingini í bókini "Mellem hængekøje og spændetrøje", sum kom út í gjár. Har skrivar hon m. a., at flokkur hennara fær altsamt minni og minni týdning og hvørvur í tí politiska landslagnum í Danmark.

Pernille Frahm hevur verið í hornatøkum við leiðsluna í Sosialistiska Fólkaflokkinum fyrr. Formaðurin í flokkinum, Holger K. Nielsen, vil ikki gera nakrar viðmerkingar til tann dapra spádómin hjá floksfelaganum, skrivar Politiken.

# Fleiri kundu verið bjargað hiðani

**Kapping ímillum løgregluna og sløkkiliðið í New York og vánalig útgerð forðaðu bjargingararbeiðinum aftan á atsóknina 11. september í 2001**

11.9.2001
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



Aftan á yvirgangsatsóknina at World Trade Center og Pentagon tann 11. september í 2001 róstu amerikanararnir sløkkiliðsmonnunum og løgreglumonnunum í New York fyri tað stóra bjargingararbeiðið.

Men nú fáa sløkkiliðið og løgreglan eitt annað skoðsmál. Undir einari hoyring týsdagin kom fram, at høvdu tær báðar tænasturnar ikki kappast ímóti hvør aðrari, høvdu tær ivaleyst kunnað bjargað nógvum av teimum, sum lótu lív. Harafturat kom fram, at bjargingarútgerðin var yvirhøvur sera vánalig.

– Tað, sum løgreglan og sløkkiliðið gjørdu, var ikki meiri, enn eitt skótalið kundi gjørt, segði ein av limunum í teirri serligu nevndini, sum kannar umstøðurnar aftan á atsóknina.

Undir hoyringini kom millum annað fram, at fólk, sum vóru í teimum báðum bygningunum, og sum bóðu um hjálp, fingu mótsigandi upplýsingar frá teimum báðum tænastunum. Eitt nú fingu summi boð um at verða verandi á skrivstovunum, meðan onnur fingu boð um at kvika sær út sum skjótast. Fólk, sum spurdu, hvørja hædd flogførini høvdu rakt, fingu einki svar.

# Bankamaður við áræði

**Hóast hann er 78 ára gamal, hevur amerikanski tjóðbankastjórin játtað at halda fram fýra ár afturat**

USA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

– Hann ger eitt frálíkt arbeiði, segði talsmaðurin hjá George W. Bush, forseta, Scott McClellan, tá forsetin hevði boðað frá, at hann hevði gjørt av at biðja Alan Greenspan halda fram sum nevndarformaður í amerikanska tjóðbankanum.

Sjálvur sigur Greenspan, at honum nýttist ikki langa tíð til at umhugsa áheitanina frá forsetanum.

– Eg kenni tað sum ein stóran heiður, at forsetin vil hava meg at halda fram. Tekur Senatið undir við tí, eri eg til reiðar at halda fram í starvinum, sigur tann 78 ára gamli bankamaðurin.

# Kann elva til nei í Danmark

**Nógv bendir á, at Danmark missir tann fasta sessin í ES-nevndini, og tað kann ávirka fólkaatkvøðuna um grundlógina**

DANMARK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Sum er hevur Danmark ein kommiser í ES-nevndini, men nú limalondini stríðast um valdið í sambandi við ta ætlaðu grundlógina, bendir nógv á, at Danmark fer at missa tann fasta nevndarsessin.

Stjórnin í Keypmannahavn hevur lagt stóran dent á at varðveita tann fasta nevndarsessin, og politiskir eygleiðarar halda, at tað kann koma stjórnini illa við, fær hon ikki sín vilja.

Danir skulu á fólkaatkvøðu um grundlógina hjá ES, og Lykke Friis, sum er Evropa-serfrøðingur hjá danska ídnaðarfelagnum, sigur við Berlingske Tidende, at missir Danmark nevndarsessin, kann tað ávirka úrslitið av fólkaatkvøðuni.

– Nevndarsessurin er vorðin ein heilag kúgv. Hann er tað einasta sjónliga tekinið um, at Danmark hevur ávirkan á tað evropeiska samstarvið, sigur Lykke Friis.

ítróttur
Nr. 95 • hósdagur • 20. mai 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

## Komandi dystir

**1. deild menn**

| Dagf. | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 20.05 | B36-NSÍ | Páll Augustinussen |
| 20.05 | KÍ-GÍ | Eiler Rasmussen |
| 20.05 | ÍF-HB | Suni Johansen |
| 20.05 | B68-Skála | Oddmar Andreasen |
| 20.05 | EB/S-VB | Petur Skarðenni |

**2. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 20.05 | B36-FSV | Petur H. Joensen |
| 20.05 | TB-Sumba | Jens P. Brattalíð |
| 20.05 | VB-AB | Tummas P. Olsen |
| 20.05 | B71-LÍF | Georg Rasmussen |
| 20.05 | KÍ-Royn | Dagfinn Olsen |

**3. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 20.05 | Fram-NSÍ | Johnleif Gerðisá |
| 20.05 | EB/S-TB | Regin Egholm |
| 20.05 | ÍF-HB | Hans F. Hansen |
| 20..05 | B68-Skála | Edvard Højgaard |
| 20.05 | SÍ-GÍ | Kristin av Kák |

# Stórur áhugi fyri finaluni



*Tvær reisur hevur Todi verið tapandi parturin av donsku steypafinaluni. Kanska verður øðrvísi, nú triðja royndin skal gerast*

**Higartil hevur Todi Jónsson tapt tvær finalur og onga vunnið, síðani hann í 1990 var við til at vinna Løgmanssteypið**

DONSK STEYPAFINALA
*Jóannes Hansen*

Kristi himmalsferðardagur er dagurin, tá ið danska steypafinalan í fótbólti verður spæld. Soleiðis hevur tað verið í mong ár, og soleiðis er tað eisini í ár. Serstakt er tað, at ein føroyingur er partur av finaluni. Talan er um Toda Jónsson, sum er á fimtan manna liðnum hjá FCK. Um Todi sleppur upp í part á vøllinum, og hvussu nógva spælitíð hann kanska fer at fáa, ber ikki til at siga nakað um frammanundan.

Tað er ógvuliga stórur áhugi í Danmark fyri endadystinum í steypakappingini millum FCK og AaB, sum eftir lutakast eigur heimavøll. Hetta hevur við sær, at FCK liðið ikki fer at vera í hvíta búnanum, sum teir vanliga spæla í Parkini í. Teir fara at vera í svarta útivallar búnanum.

Fyrrapartin í gjár varð roknað við, at øll atgongumerkini fara at verða seld. Tað vil siga, at áskoðaratalið fer at vera omanfyri fjøruti túsund. So mong vóru eisini í Parkini hóskvøldið, tá ið FCK vann á Brøndby, og so mong fara at vera í Parkini, tá ið FCK og AaB sunnudagin fara at spæla landskappingardyst. Tað vil siga, at í trimum dystum í eina stóra viku fara fleiri enn 120 túsund at møta upp í Parkini fyri at hyggja at FCK. Tað kann ikki sigast annað, enn at áhugin fyri fótbólti er størri í danska høvuðsstaðnum og í Danmark, enn hann hevur verið í mong, mong ár.

### Tapt tvær ferðir

Á heimasíðu síni, todi.fo, sigur Todi Jónsson, at hann higartil bara hevur verið millum tapararnar í donskum steypafinalum. Hann sipar til finalurnar í 1998 og í 2002, tá ið FCK tapti ávikavíst ímóti Brøndby (4-1) og OB (2-1).

FCK hevur vunnið steypafinaluna tvær ferðir. Fyrra ferðin var í 1995, tá ið teir smurdu AB av 5-0, og seinna ferðin var í 1997, tá ið FCK vann 2-0 á Ikast. Todi kom úr Lyngby og til FCK á sumri í 1997.

Einasta ferðin, at Todi Jónsson hevur vunnið steypafinaluna, var í 1990. Ta ferðina spældi hann við KÍ. Í finaluni vunnu teir 6-1 á GÍ. Todi Jónsson staðfesti stórsigurin hjá klaksvíkingum við at skora síðsta málið.

J. Broncks gøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo
WWW.SMYRIL-LINE.COM

Harmonikutúrurin
á Noregsferðini 6. til 8. september

Prísur fyri hvønn úr 800,-



**Vælumtókti harmonikutúrurin** við Norrönu verður í ár 6. – 8. september, har Fimmbogi Lisberg og Pauli Jacobsen skipa fyri.

Fleiri góð harmonikulið luttaka á túrinum.

Liggið ikki sjóvarfallið av tykkum, men bíleggið ferðina í góðari tíð.

PRÍSIR

| | |
|---|---|
| Couchettir | 800,- |
| 4 koyggjukamar v. wc/bað innv. | 900,- |
| 4 koyggjukamar v. wc/bað útv. | 1.000,- |
| 3 koyggjukamar v. wc/bað innv. | 1.200,- |
| 3 koyggjukamar v. wc/bað útv. | 1.400,- |
| 2 koyggjukamar v. wc/bað útv. | 1.700,- |

Prísurin fatar um ferð fram og aftur á farleiðini Tórshavn-Bergen (matur og drykkjuvørur ikki íroknað).

SMYRIL LINE